# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

NSÍ-B71 4-0 (1-0):

# NSÍ eigur unglingasteypið

**B71 gav dygga mótstøðu í knappan tíma, men tá teir fingu mann útvístan kundi NSÍ staðfesta ein ruddiligan sigur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Tá sandoyingar fyrst fingu mann útvístan, gekk tað skjótt fyri seg. Og tá 90 minuttir vóru farnir, hevði NSÍ vunnið ein tryggan sigur*
*Mynd: Johnny Lamhauge*

FM-finalan í fótbólti hjá unglingum varð spæld á ovara vølli í Gundadali í gjár.

Finalan stóð hesa ferð millum NSÍ og B71, og heilt fitt av viðhaldsfólki hjá báðum liðunum høvdu leitað sær til Havnar at stuðla sínum dreingjum.

Og spælararnir løgdu eisini nógv fyri. Hvørgin parturin hevði hug at leggja seg aftur at verja, og tí gjørdist talan fyri tað nógva um ein sera undirhaldandi dyst.

Málmøguleikarnir trutu ikki, og londu eftir 10 minuttum legði NSÍ seg á odda, eftir at Filip Jacobsen varð spældur púra leysur móti málverjanum.

## Útvísing kostaði

B71 royndi tó støðugt at svara aftur. Talan gjørdist eisini um fleiri opnar møguleikar, og einar tvær ferðir vildu sandoyingar hava brotsspark, eftir at spælari fór um koll í NSÍ-brotsteiginum..

Tað kom tó at kosta sandoyingunum dýrt, at teir fingu spælara riknan av vølli tíðliga í seinna hálvleiki. Hóast sandoyingar høvdu roynt at trýst, so var NSÍ á ongan hátt fyri ongum, og við 11 móti 10 settu teir seg av álvara á dystin.

Og tá hol kom á, so tók tað ikki meira enn góðar fimm minuttir at staðfesta sigurin. Øssur Dalbúð var púrasta leysur, tá hann økti til 2-0.

Og tvær ferðir kom Jens Joensen eisini at standa somikið væl fyri, at hann uttan stórvegis hóvasták kundi økja til bæði 3- og 4-0.

Sigurin hjá NSÍ var tann fimti, meðan spælt hevur verið um hesa útgávuna av FM-steypinum, og tí eiga runavíkingar nú steypið til ognar. Ein undirstrikan av støðuga ungdómsarbeiðnum, sum NSÍ hevur framt í skjótt nógv ár, og sum eisini varð undirstrikað við FM-gullinum, sum felagið í fjør vann í Formula-deildini.

**NSÍ-B71 4-0 (1-0)**
**1-0:** Filip Jacobsen, 10.
**2-0:** Øssur Dalbúð, 60.
**3-0:** Jens Joensen, 62.
**4-0:** Jens Joensen, 65.

# Býarkoyring og fjallasúkkla

**Aftur hetta vikuskiftið verða FM-kappingar á súkklu. Hesa ferð er býarkoyring á Velbastað og fjallasúkkling í Hoydølum**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

At skipa fyri býarkoyring í Havnar Býi er kanska ikki tað lættasta, tí hetta krevur eisini, at ferðslan verður avbyrgd á økinum, har súkklað verður.

Tað fekk í fjør súkkluítróttina at leita til Velbastaðar, tá súkklulandsliðið til Oyggjleikirnar skuldi veljast. Og tað verður á sama teini, at FM-kappingin í ár verður súkklað. Startur og mál er við Eggverikið á velbastað, og saman lagt er rutan á leið tríggjar kilometrar. Og so verður koyrt eftir hesum teinum í trý korter, áðrenn seiansta umfarið ger av, hvør vinnur kappingina.

Kappingin leygardagin byrjar longu klokkan 8 um morgunin, og er freistin at boða frá luttøku fríggjakvøldið klokkan 20.

## Fjallasúkkling í Hoydølum

Meðan býarkoyringin er á Velbastað, verður leitað nærri høvuðsstaðnum, tá fjallasúkklingin er á skránni.

Eins og í fjør verður koyrt á einum teini við Studentarskúlan í Hoydølin, og aftur hesa ferð verður koyrt sum MTB Criterium. Tað vil siga, at reglurnar eru tær somu, sum tær eru til býarkoyringina, tó at tíðin hesa ferð er sett til hálvan tíma pluss eitt umfar.

Børn sleppa eisini at royna seg sunnudagin, og meðan tey vaksnu og unglingar byrja klokkan 13, byrja kappingarnar millum børnini klokkan 14.

Børnini kappast í trimum bólkum, og kappast verður millum gentur og dreingir.




*Tað kann ganga eitt sindur rokaligt fyri seg, tá kappast verður á fjallasúkklu*
*savnsmynd*